# Frá vetri til várs

BÓKAÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Uttanfyri vindeygað togast vetur og vár um valdið. Best sum ein var farin at halda, at várið var í hond um, herjar veturin á aftur við nýggjari megi. Men so hæsar kavarokið av - og sólin stavar á fjørðin og minnir okkum á, at várið fer at vinna á vetrinum.

Meðan henda togan fer fram í náttúruni, kemur eitt lítið yrkingasavn í bókabúðirnar, ið ber heitið "Frá vetri til várs". Yrkingasavnið Frá vetri til várs hevur Margit Martinsdóttir Baadsager týtt úr donskum eftir rithøvundin Jette Classen.

Savnið lýsir inniliga og yndisliga, hvussu ein mamma kennir tað at fáa boð um, at barn hennara er brekað - og hvussu hon búnast við hesi vitan, so hon eftir sorg og vónloysi aftur sær vón og gleði í lívinum.

*Náttin eg fekk teg*
*var eydnusom*
*dagurin eftir*
*var órógv*

*Ein rødd í mær segði*
*at har vóru ósøgd orð...*

verður sagt í byrjanini á savninum. Seinni - eftir fleiri bæði inniligar og skemtiligar hendingar - verður sagt:

*Tað tú lærdi meg tey árini er*
*styrki mín í dag*
*eg lærdi: tak ein dag í senn*
*og gleð teg yvir tann minsta*
*lutin*
*so klára vit alt saman*

Á bakpermuni sigur Maud Vang Hansen, leiðari á verkstaðnum Vón, um savnið:

Jette Classen letur upp eina verð, sum er ókend fyri tey, sum ikki liva í henni.

Hennara tráan eftir at vita tað, eingin við vissu veit, er stór.

Her er móðurkærleikin tvinnaður saman við ótta og óvissu.

Tvístøðan millum at sleppa og at halda fast verður lýst við rámandi erligheit.

Samanumtikið eitt yrkingarsavn har tað óvanliga og sorgfulla verður lýst við læandi optimismu, dýpd og kærleika.

Á Grækarismessu - nú vit slota út í tann víkjandi veturin at vita, um okkurt várligt "klipp" er at hoyra, letur hetta lívgandi yrkingasavnið okkum vita, at eftir vetur kemur vár - eisini í kenslum teirra, sum hava fingið eitt barn við breki.

Tað er Javni - felagið fyri menningartarnað og teirra avvarðandi, ið hevur givið savnið út við stuðli frá Tiltaksgrunninum hjá MBF og Føroya Lívstrygging LIV.

Limir Javna fáa yrkingasavnið sendandi við postinum. Annars fæst yrkingasavnið Frá vetri til várs eisini í bókabúðunum fyri 50 krónur.


Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

## KT-STARV Á HAGSTOVUNI

VIT SÓKNAST EFTIR EINUM VÆL ÚTBÚNUM STARVSFÓLKI TIL KT DEILDINA.

Á Hagstovuni verða flestu hagtalsuppgávur loystar í samstarvi millum hagfrøðingar og KT starvsfólk, og tað er til slíkar verkætlanir, at vit sóknast eftir eftir einum fólki.

KT skipanirnar á Hagstovuni eru grundaðar í einum Oracle umhvørvi við bæði UNIX og WINDOWS teldum. Í arbeiðinum á KT deildini verða brúkt Oracle menningar- og forritannar-amboð, sum SQL, PL/SQL, Warehouse Builder etc. Somuleiðis brúka vit Oracle IAS/PORTAL í samband við heimasíðuna hjá stovninum.

Kunnleiki til eitt ella fleiri av hesum amboðum er ein fyrimunur, men ikki ein treyt. Fyrst og fremst sóknast vit eftir einum dugnaligum fólki, við innliti í datamodell, databasuskipanir og programmering.

Trý fólk eru í KT-deildini, og eru tey uppi í øllum verkætlanum á stovninum. KT arbeiðið á stovninum er eyðkent av, at nýggjar skipanir alsamt verða mentar, samstundis sum verandi skipanir verða víðari mentar. Sostatt er arbeiðið ógvuliga fjølbroytt og møguleiki er at royna seg á nógvum KT økjum.

Starvið verður lønt í samsvari við førleikar og starvsinnihald, sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. apríl 2005.

Set teg í samband við Berg Dam ella Hermann Oskarsson á Hagstovu Føroya, telefon 35 28 00 vilt tú hava meira at vita um starvið.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO





Nýggj útbúgving
**Byggitøkningur**



**Útbúgvingin tekur 2 ár og fevnir m.a. um:**
- Kunningartøkni, mál, alisfrøði
- Bygningskonstruktión
- Tilrættalegging og byggileiðslu
- Projektering og útbjóðing
- Framleiðslu av bygningslutum
- Goymsluleiðslu og -stýring
- Byggiumsiting

**Upptøkukrøv**
- Handverksútbúgving í viðkomandi yrki
- studentsútbúgving
- SIT 2. støðisár
- HIF
- HH
- HT
- HF

**Útbúgvingin byrjar 15. august 2005**

FØROYAPRENT - TEL. 314 555

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

Marknagilsvegur 75 · Postboks 239 · 110 Tórshavn · Tel. 311 957 · Fax 316 621 · www.tst.fo · tst@tst.fo



FRAMLEIÐSLUTØKNINGUR

BYRJAR 15. AUGUST 2005



**Útbúgvingin tekur 2 ár og fevnir m.a. um:**
- maskinkonstruktión
- framleiðslutøkni
- framleiðslu og virkisleiðslu
- leiðsla-samstarv
- støddfrøði/alisfrøði
- teldulæra (mest CAD-programmir)
- virkisbúskapur
- automatión



**Upptøkukrøv:**
- handverksútbúgving í viðkomandi yrki
- studentsútbúgving
- SIT 2. støðisár
- HIF
- HH
- HT
- HF

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

Marknagilsvegur 75 · Postboks 239 · 110 Tórshavn · Tel. 311 957 · Fax 316 621 · www.tst.fo · tst@tst.fo